Tíðindabrævið
Hugin&Munin
Granskingarverkætlanin fyri Økismenning

Nr. 3 november 2001 2. árg.

# Væleydna lokalt samstarv



Haram kommuna liggur beint norðan fyri Ålesund og har búgva umleið 8700 fólk. Fólkatalið í kommununi hevur verið rættiliga støðugt tey seinastu 20 árini, men er tó minkað nakað. Haram kommuna er ein ídnaðarkommuna við nógvum framleiðslufyritøkum, sum m.a. framleiða fiskivinnutøkni, byggja skip og møblar. Nógvar fyritøkur eru kendar fyri at vera tekniskt framkomnar og klára seg væl í altjóða kappingini. Vitanin og førleikin gjørdi fleiri av teimum størstu fyritøkunum í Haram so mikið áhugaverdar, at tær, í 1980unum og 1990-unum,blivu keyptar av fremmandum fyritøkum – bæði útlendskum og innlendskum. Nýggju ognarviðurskiftini gjørdu, at lítið samstarv var millum fyritøkurnar og lokalsamfelagið.

Í økinum kring Ålesund er ein felagsskapur, ið kallast Nordvest Forum, ið hevur til uppgávu at birta uppundir leiðsluliga førleikamenning hjá teimum mongu fyritøkunum, sum eiga partabrøv í felagsskapinum; endamálið er at betra lokala kappingarførið. Hetta ger Norvest Forum við at skipa fyri bæði styttri og longri skeiðum, eins og tey skipa fyri fyrilestrum og seminarum. Í byrjanini av 1990-unum legði Nordvest Forum fram tankarnar hjá Harvard professaranum Michael E. Porter úr bókini ”The Competitive Advantage of Nations”, um tað stimbrandi ávirkan, tað hevur hjá fleiri fyritøkum av sama slag at liggja í sama øki.

Við íblástri frá hesum tók kommunan í Haram stig til at skapa eitt stað, har leiðarar í lokala vinnulívinum, politikarar, eins og fólk úr umsitingini, kundu hittast. Hetta var fyrstu ferð hesi hittust at kjakast um økismenning. Tey vóru samd um, at kommunan hevði ein framtakshugaðan og vaksandi ídnað, men at lokalsamfelagið ikki hevði megnað at brúka hetta í lokalum menningarætlanum.

**Haram på Kartet**

Í 1995 drógust fyritøkurnar í Haram við ein positivum trupulleika, sum var, at lokalu fyritøkurnar tørvaðu faklærda arbeiðsmegi. Ein kanning vísti, at tað manglaðu fleiri enn 200 handverkarar. Fyritøkurnar høvdu hvør í sínum lag roynt at skaffa fólk, men uttan nøktandi úrslit. Arbeiðsloysið í økinum var lágt, og bara fá av teimum, sum vóru flutt burtur, vóru áhugaði at koma aftur. Afturat hesum hildu arbeiðsleysir handverkarar aðrastaðni í Noregi ikki Haram vera eitt áhugavert stað at søkja sær arbeiði. Talan var sostatt um eina stóra uppgávu, sum var trupul at loysa.

Fyri at loysa hendan trupulleikan valdu lokalar fyritøkur, kommunan og arbeiðsloysisskipanin at samstarva um eina samlaða rekrutteringsætlan. Í samstarvi við einari stóra ráðgevingarfyritøku bleiv rekrutteringsætlanin *Haram på kartet* fyriskipað, har Haram bleiv marknaðarførd í sjónvarpinum og teimum stóru bløðunum. Úrslitið av kunningarherferðini var gott, og ikki færri enn 2000 fólk úr øllum Noregi søktu tey 200 størvini; sostatt var starvsfólkatrupulleikin loystur fyri fyrst. Søgan úr Haram vísir, at andlitið hjá einari kommunu úteftir hevur týdning, og at tað ber til at ávirka myndina, sum fólk í restina av landinum hava av økinum.

Hóast væleydnaða tiltakið, so vóru nýggjar avbjóðingar fyri frammam, tí bústaðarviðurskiftini eins og lokalu tænastutilboðini vóru ikki nøktandi. Góðu royndirnar við samstarvi gjørdu, at lokalu aktørarnir vóru tilreiðar at halda fram við samstarvinum. Eisini vóru teir sannførdir um, at trupulleikarnir við fráflyting og tørvi uppá arbeiðsmegi ikki kundi tryggjast einans við einstøkum tiltøkum. Ein menningarætlan bleiv løgd, ið leggur dent á ’stadsudvikling’, vinnu- og førleikamenning. Stórur dentur verður lagdur á partin, sum handlar um førleikamenning og hava lokalu útbúgvingarstovnarnir ein týdningarmiklan leiklut í hesum. Ikki færri enn 32 virkisleiðarar, politikarar, starvsfólk hjá kommununi og fólk frá útbúgvingarstovnunum eru beinleiðis við í arbeiðnum. Afturat hesum eru fleiri enn 100 fólk knýtt at ætlanini. Ætlanin umfatar millum annað eitt samstarv við bæði telefyritøkuna Telenor og og teldufyritøkuna IBM um at skipa soleiðis fyri, at tann besti skúlan innan kunningartøkni skal vera í Haram kommunu.

*Keldur*:

Amdan, J (2000) Confidence Building in Local Planning and Development. Some experience from Norway. www.haram.kommune.no

Tangen, G. Co-operation in Haram municipality; the Haram model.



# Grannastevna

***Michael Paul og Lynn Reveal***
Reveal International: Legal and Business Consultants, Tórshavn

# Grannastevnan eigur at verða endurreist

Sum greinirnar í Hugin & Munin bera boð um, so er spurningurin um burðardyggleika og menning á bygd og í økishøpi ikki serføroyskt fyribrigdi. Kring allan heimin kýta folk seg fyri at gera og seta í verk menningarætlanir, ið virka, til tess at steðga fólkaflytingini av bygd. Í hesi grein leggja vit fram nøkur hugskot, ið vónandi fara at ríka orðaskifti, ið longu fer fram í Hugin & Munin.

Síðstu 150 árini hevur heimurin verið fyri dramatiskum broytingum. Føroyar umskiftust frá at vera eitt land við landbúnaðarbygdum, ið kláraðu seg sjálvar, til eina modernaða fiskivinnutjóð, ið var samantvinnað við heimsmarknaðin og hevði ein alsamt vaksandi høvuðsstað. Samstundis broyttist fatanin av, hvat er grundarlagið fyri einum lívi, ið gevur meining. Fyri at leita upp arbeiði, nýggjar møguleikar og betri útbúgving rýmdu vit úr okkara heimbygdum, men mong okkara komu síðani eftir, at okkum longdist aftur, leitandi eftir einari fyrigyklaðri kenslu av nøgdsemi og vælveru, sum vit ikki funnu í stórbýunum. Tað er ómøguligt – og heldur ikki eftirynskjandi – at flyta klokkuna aftur so at siga og venda aftur til tað, vit eina ferð vóru. Setningurin er tí at leita fram tey element, sum ríka lívið, og fáa tey at vera partar av modernaða samfelagnum.

Meginparturin av økismenningarætlanum kring heimin eru sett upp við búskaparligum málum einans. Tær eru orðaðar av stovnum uttaneftir ella av stjórnarskrivstovum, sum ikki í nóg stóran mun taka við tann felagsvísdóm, ið bygdarsamfeløgini eiga. Fyri at rættiliga at vera munadyggar áttu økismenningarætlanir at havt í huga allar tættir í tørvunum hjá einstaklingunum og bygdarsamfeløgum teirra, eins og tær skuldu tikið við týdningin, ið bygdarsamfeløgini hava fyri vælferðina ella trivnaðin hjá allari tjóðini. At seta á skránna hesar spurningar er ein tilgongd, ið áliggur bæði myndugleikum og borgarum. Fólkslig hugskot og fólksligt orðaskifti eru virðismikil, serliga á grasrótastøði. At orða okkara felagstørv og eftirsíðan at seta okkum menningarsetning til tess røkka okkara málum krevur av okkum, at vit eru reiðilig, ósjálvsøkin, óbundin av kenslum og halda okkum til fakta í øllum orðaskiftum, sum vit taka lut í.

Í Føroyum hava vit aldargamla siðvenju at ráðleggja saman í smáum bólkum til tess at loysa ymiskar sosialar og búskaparligar spurningar, ið tóku seg upp: *Grannastevnan*, *hagastevnan* og *vártingið* eru dømi um hettar. Hesir siðbundnu fundir vóru opnir og tóku lokalar røddir fyri fult. Hevði tað eydnast at givið hesari grundhugsanini nýggja megi og víðkað hana til at umfata allar røddir – mannfólk, konufólk, ung og gomul – so kundi hon verið ein smidlig mekanisma, ið vit brúktu til – opið og sakliga – at rannsaka fjølbroytnið í okkara felags vísdómi. Okkara fjølbroytni hevði sostatt verðið ein styrki í okkara stremban eftir munadyggum loysnum. Fyri okkara valdu umboð á tingiog í kommunustýrum hevði samskifti við slíkar fundir virka sum ein virðismikil kelda við hugskotum og íblástri.

Sama á hvørjum støði vit tosa um ráðlegging, so eigur hon ikki at fara fram í leysum lofti. Hetta tíðindabrævið, Hugin & Munin, er eitt frálíkt dømi um eitt forum, ið ber fram kunning, sum víðkar okkara sjónarring. Hinvegin, so noyðist hvør einstakur okkara at taka ábyrgd fyri at kanna, savna inn og grunda yvir kollektivu royndirnar hjá øðrum kring knøttin. Virði í sambondum ella *networking* kann ikki yvirmetast. Onnur smásamfeløg hava gjørt teirra royndir, í summum førum hava tey havt hepna hond og í øðrum førum hava tey gjørt mistøk, tá ið tey hava roynt at finna svar uppá tær somu avbjóðingarnar, ið vit standa yvirav. Jú meiri *networking*, tess betri eru vit før fyri at leita fram møguligar loysnir og sostatt sleppa undan kostnaðarmiklum mistøkum. Tak t.d. statin Vermont í USA: Í áravís var hann plágaður av, at ungdómurin flýddi úr teimum mangan isoleraðu bygdarløgunum og til gyklandi býirnar í New England, men stovnaði so *Center for Rural Studies*, ið líkist okkara *Granskingardepli fyri Økismenning*. Amerikanski granskingardepilin hevur eitt formligt tilknýti til universitetið í Vermont og við Honduras í Miðamerika. Heimasíða teirra eitur http://crs.uvm.edu. Vit kundu óivað havt gagn av at samskift við hendan granskingardepilin í Vermont eins væl og við aðrar av sama slag. Mong universitet hava deildir, ið burturav fáast við gransking av viðurskiftum á bygd. At fingið í lag samband við ein slíkan stovn kundi havt við sær hugskot, men kundi eisini givið atgongd til fígging.

Djúptøkin, fundvís og miðvís ráðlegging er ikki minst treytað av ómaksleysari atgongd til kunning. Thomas Powers, ið hevur skrivað *bestseljarin Ecosystem: Living the 12 Principles of Networked Business*, grundgevur fyri, at myndugleikarnir eiga at síggja til, at borgararnir hava óavmarkaða atgongd til alnótina. Átakið higartil hjá Vinnumálstýrinum at seta upp tráðleyst samband til íbúgvarnar í Svínoy og Fugloy geva vónir um slíkt samband í framtíðini fyri alt landið. Hinvegin, so er slík sambinding ikki nóg mikið. Okkara førleiki at tosa enskt má betrast. Okkara vaksandi førleiki at samskifta væl á enskum fer óivað at gera okkum før fyri at luttaka á meiri jøvnum føti í heimsins handilsliga og mentanarliga umhvørvi. Sostatt er tað átrokandi, at serliga okkara unga fólk umframt sítt egna móðurmál eisini dugir flótandi tað málið, sum í dag er heimsins altjóðamál.

Tilevnanin av einari hollari ætlan fyri útjaðaramenning er ein líðandi tilgongd. Tað fer óivað at taka áratíggju (ella meiri), sohvørt sum vit leita fram, seta í verk og menna loysnir. Atgongd til kunning fer at stimbra hugflognum og grasróta-orðaskiftinum. Samstundis fer fjølbroytnið í okkara sjónarmiðum at koma fram í ljósið, javnastøðan kynjanna millum verður betri, dreymarnir hjá ungdóminum fáa orð, lívsvirði verða orðað og sleppa at standa sína roynd, alt við tí fyri eyga at tryggja grundarlagið undir menningaravgerðum, ið eru rættvísar og hava fyrilit fyri tørvinum og strembanini hjá tí einstaka bygdarsamfelagnum í sjálvum sær, men eisini fyri tjóðini sum heild.

## Úr okkara egna heimi:

# Við í altjóða gransking innan alvinnu

Nógvar milliónir vera nýttar í gransking innan alivinnu. Orsøkin er einføld. Fólkatalið í heiminum veksur almikið, og tí er neyðugt at finna nýggjar mátar at breyðføða heimsins íbúgvar. Aling av livandi djórum stendur sum ein tann fremsti møguleikin, men við nógvum hátøkniligum, bio–logiskum, vinnuligum og samfelagsligum avbjóðingum.

Granskingardepilin er vorðin partur av einum størri canadiskum átaki, sum kallast Aquanet. Aquanet byggir á eitt samstarv millum náttúru–frøðiliga og samfelagsfrøðiliga gransking, fyri á tann hátt at byggja brúgv millum ymisku avbjóðingarnar í vinnuni.

Okkara lutur í hesum projekti er innan samfelags–frøði. Endamálið er at kanna, hvussu alivinnan megnar at umskipa seg í mun til alt størri trýst frá altjóða marknaðinum. Harafturat hevur projektið til endamáls at greina, hvønn týdning alivinnan hevur – og kann fáa - fyri lokala vinnuliga menning í útjaðaraøkjum.

Við at samanbera so ymisk samfeløg sum Noregi, Chile, Canada og Føroyar er møgu–ligt at greina, hvussu saman–spælið millum vinnu, almennar reguleringar og lokalsamfeløg er. Hetta hevur alstóran týdning fyri, hvussu alivinnan í framtíðina kann gerast eitt burðardygt ískoyti til vinnu–ligu menningina av útjaðara–økjum sum Føroyar.

Nærri upplýsingar: Granskingardepilin ella www.aquanet.mun.ca

---

# Kommunuverkætlan á Grannskingar-deplinum fyri Økismenning

Granskingardepilin fyri Økis-menning hevur nú smá tvey ár á baki, og hevur í hesum tíð-arskeiði verið arbeitt við tveimum høvuðsevnum. Í fjør var evnið vinnulívsmenning eftir búskaparkreppuna, og vórðu nøkur økið í landinum vald út og viðgjørd í hesi verkætlanini. Úrslitið av hes-um arbeiði fyriliggur í bók, „*The Restructuring of the Faroese Economy: The Signi-ficance of the Inner Peri-phery*“, sum væntandi kemur út í desember mánaða. Seinni verður ein føroysk útgáva av bókin skrivað, sum kemur út seint komandi vár.

**Kommunur og bygdasam-feløg**

Í ár og komandi vár er høvuðs-evnið „Kommunur og bygda-samfeløg“. Hendan gransk-ingarverkætlan umfatar partvís spurningin um politisku skip-anina í kommunuhøpi, tvs. allan spurningin um avgerðar-rætt og ábyrgd kommunanna. Harundir eisini hvussu ymiskt kommunurnar í Føroyum er skipaðar við m.ø. kommunalum samstarvi.

Harumframt verða eisini viðgjørdi teir tættir, ið krevjast til fyri at skapa trygd og trivnað í einum bygdasam-felag, sum t.d. skúli, heilsurøkt, eldrarøkt, barnaansing, frítíð-armøguleikar, vinnumøgu-leikar os.fr.

Eins og undanfarið ár, eru nøkur økið í landinum vald út, fyri at lýsa nevndu spurningar. Húsar og Gjáar kommunur eru valdar út fyri at lýsa, hvussu tvær smærri kommunur verða skipaðar. Hósvíkar og Kví-víkar kommunur eru við í eini verkætlan, sum viðgerð spurningin um, hvussu tað ávirkar eitt bygdasamfelag, at tann stóri parturin av arbeiðs-megini arbeiðir uttan fyri bygdasamfelagið, og pendlar til og frá arbeiði hvønn dag.

Umframt hetta eru Vágarnar og Sandoyggin umfataðar av eini verkætlan um kommunualt samstarv. Og eru Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum somuleiðis um-fataðar av eini líknandi verk-ætlan um kommunalt samstarv.

Eins og verkætlanin í fjør, so verða kommunuverkætlan-inar eisini givnar út í bók, umframt at tær verða givnar út í Notat-seriuni hjá Gransk-ingardeplinum fyri Økis-menning. Tær fyrstu útgáv-urnar verða væntandi tøkar í februar mánaða komandi ár.



Kelda: Matrikulstovan

# www.region.fo

Í endamálsorðingini hjá Granskingardepilin fyri Økismenning stendur m.a., at Granskingardepilin fyri Økismenning skal savna inn og skipa vitan, ið er viðkomandi í økismenningarhøpi – og harumframt at breiða vitan út í føroyskum og altjóða høpi.

Higartil hevur hetta m.a. verið gjørt við at granskarar á Granskingardeplinum fyri Økismenning hava gjørt framløgur á ráðstevnum, fundum o.l., og eisini við útgávu av bók (ið kemur um ársskiftið), greinum og øðrum skrivligum tilfarið, umframt at Granskingardepilini fyri Økismenning hevur egið tíðindabræv, Hugin & Munin. Nú hevur Granskingardepilin fyri Økismenning eisini fingið egna heimasíðu. Adressan er www.region.fo

Á heimasíðuni, sum er bæði á føroyskum og enskum, verður greitt frá Granskingardepilinum fyri Økismenning, hvørjar granskingarverkætlanirnar eru, hvussu granskingardepilin er skipaður, fíggjaður og so framvegis. Harumframt eru útgávurnar hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning eisini á heimasíðuni í PDF-formati, soleiðis at tær til nær tað skal vera kunnu ”takast niður” og goymast á egnari teldu ella prentast út.



*Heimasíðan www.region.fo*

**Hagtøl**

Ymisk onnur hagtøl vera eisini at finna á heimasíðuni, eins og nýggj hagtøl verða løgd út á heimasíðuna við jøvnum miðlumbilum. Sum er, so er bert talan um fólkahagtøl, t.v.s. gongdin í fólkatalinumm síðan 1950 fram til í dag, og hartil í útvaldum tíðarskeiðum; hesi hagtøl eru býtt á kommunur og landspartar/øki. Harumframt er alders- og kynsbýtið í útvaldum árum eisini at finna millum hagtølini á heimasíðuni.

Hesi hagtøl geva eina mynd av, hvussu gongdin í fólkatalinum hevur verið í teirri einstøku kommununi, umframt at tað eisini fæst eitt innlit í, hvussu alders- og kynsbýtið í hevur verið ávirkað av búskaparkreppuni. Slík hagtøl kunnu eisini brúkast sum amboð hjá kommununi, t.d. í samband við at kommunustýrið leggur ætlanir fyri barnaansingar-, skúla- ella eldraøkið komandi árini.

**Lønarhagtøl á heimasíðuna í næstum**

Í næstum verða lønarhagtøl fyri útvald ár, býtt á landspartar/øki, løgd út á heimasíðuna. Eisini miðal lønarútgjaldingar í útvaldum vinnugreinum, býtt á landspartar/øki, verða løgd út á heimasíðuna. Hesi hagtøl geva eina mynd av, hvussu teir ymisku landspartarnir blivu ávirkaðir av búskaparkreppuni; hagtølini geva eisini høvi til at samanbera miðal lønarútgjaldingarnar í teimum ymisku landspørtunum eftir kreppuna. Hesi hagtøl eru lík teimum, ið brúkt vórðu í Økismenningarálitinum.

**Heimasíðan – ein hagtals tænasta til kommunurnar**

Sum frá líður er ætlanin, at leggja út so nógv hagtalstilfar um føroysku kommunurnar sum gjørtligt; á hendan hátt kemur heimasíðan eisini at virka sum ein hagtalstænasta til føroysku kommunurnar. Sum er, so eru nógv kommunal hagtøl at finna í Árbókunum, sum Hagstova Føroya gevur út. Flestu hagtølini á heimasíðuni hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning eru eisini úr árbókunum, men í mun til árbókina, so eru hagtølini á heimasíðuni skipaði soleiðis, at hagtølini yvir fleiri ár eru savnaði undir einum. Hetta ger, at tað er lætt at samanbera undanfarin ár og farin tíðarskeið annars.

**Tilmelding til tíðindalistan**

Á heimasíðuni er ein síða við tíðindum frá Granskingardeplinum fyri Økismenning. Á hesari síðuni verður eisini víst á allar dagføringar, ið gjørdar verða á heimasíðuni. Til ber at melda seg til ein e-mail lista, soleiðis at tygum fáa ein e-mail sendandi, hvørja ferð nýggj tíðindi eru á heimasíðuni. Hendan tilmelding fer fram á heimasíðuni, undir Tíðindi.

Útgevari:
**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
Jústagøta 1
**Postadressa:**
Postboks 159
700 Klaksvík
Tlf. 457744 & Fax 457743
Suðuroy: Tlf. 37 44 77
E-postur: region@region.fo
Heimasíða: www.region.fo
**Ábyrgd:** Dennis Holm og Bjarni Mortensen
**Umbróting:**
Miðil, Klaksvík
**Prent:**
Hestprent